# Gerðabók í sambandi við býráðsfund 2/2021

**Dagfesting:** 25.02.2021 kl. 19:00
**Málnr.:** 21/00071-2

Býráðslimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, David Andreasen, Edva Jacobsen, Eivin Breiðaskarð, Gudny Vang, Magni Jøkladal

Tiltakslimur: Lillian Jacobsen møtti fyri Ólavur Larsen, sum hevði forfall til býráðsfundin

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Henrik Weihe Joensen, kommunustjóri

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| 5/21 | 21/00041-10 | Havsbrún - Umsókn um byggiloyvi til leingjan av fóðurbryggju |
| 6/21 | 21/00061-2 | Dagføring av kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu - januar 2021 |
| 7/21 | 21/00077-5 | Íbúðarbygging úti á Land_Byggibúningararbeiði_Uppskot um at flyta bygningin og stuðlamúr 1 m longur oman ímóti sjóvnum |
| 8/21 | 21/00105-5 | Landingarkain_Pelagoskain_Umvæling av bankettini |
| 9/21 | 21/00132-3 | Lillian Jacobsen innkallað sum tiltakslimur í sambandi við býráðsfund 25. februar 2021 |
| | | |

2

**5/21**
**21/00041-10 Havsbrún - Umsókn um byggiloyvi til leingjan av fóðurbryggju**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 12.02.2021 | 3/21 |
| 2 Býráðið | 25.02.2021 | 5/21 |



**Tilráðing**

| | |
|---|---|
| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevndini. |
| Stutt lýsing | Havsbrún hevur latið inn umsókn, dagfest 13. januar 2021, um byggilovi til útbygging av fóðurkaiini. Víst verður FK j. nr. 21/00041-1 og 2.<br>Umsitingin hevur viðgjørt umsókninga sakliga og skipa fyri prosjektgransking av verkætlanini.<br>Umsitingin hevði 10 viðmerkingar til verkætlanina, sí fK j. nr. 21/00041-4.<br><br>**Prosjektgransking av teknisku deild hjá Fuglafjarðar kommunu**<br>Umsitingin hevur eftirfylgjandi havt fund við Havsbrún um prosjektgranskingina, og biðið um at fáa tekningarnar og útbjóðingartilfarið rættað samsvarandi prosjektgranskingini.<br>Neyðugt er eisini at skipa ferðsluna í økinum á ein tryggan hátt, meðan arbeiðið við at útbyggja fóðurkaina stendur uppá.<br>Eisini skulu neyðsynjaakfør sleppa framat økinum, meðan arbeiðið fer fram.<br><br>**Kommununar partur av verkætlanini**<br>Avtala er gjørd millum Havsbrún og Fuglafjarðar kommunu um, at kommunan skal bera ein part av kostnaðinum, sum er 1.7 mill. kr. Umsitingin hevur í hesum sambandi biðið Havsbrún skipað soleiðis fyri, at kommunali parturin av grótuppfyllingini varð settur í útbjóðingartilfarið, soleiðis at kommunan fær sum mest fyri tær 1, 7 mill. kr. Fyri kappingarføran kostnað. Avtalað er eisini gjørd millum Havsbrún og kommununa um, at kommunan flytir upphæddina til Havsbrún, sum skipar fyri at umseta peningin til grótfyllu fyri so kappingarføran kostnað sum gjørligt.<br><br>**Framhald 19. februar 2021** |

| | |
|---|---|
| | Málið hevur verið viðgjørt í Vinnu- og havnanevndini 12. februar í ár, har nevndin mælti til, at fylgja tilmælinum frá tekniska leiðaranum og veita Havsbrún byggiloyvi til útbygging av fóðurkaiini.<br><br>**Ískoyti 24. februar 2021**<br>Málið hevur verið viðgjørt aftur í dag í umsitingini við atliti til verandi byggisamtykt. Tá málið varð viðgjørt í vinnu- og havnanevndini varð hildið, at ikki var neyðugt at broyta verandi byggisamtykt, tí ein lutfalsliga lítil partur av havnaútbyggingini - 350 $m^2$ av umleið 6.300 $m^2$ – kemur út um verandi byggisamtykt. Í samráði við formannin í vinnu- og havnanevndini, mælir umsitingin til at geva endaligt byggiloyvi til Havsbrún við nevnda fráviki á 350 $m^2$. Í hesum sambandi arbeiðir vinnu- og havnanevndin við ætlanini um at broyta byggisamtyktina fyri havnalagið til framtíðar útbyggingar. |
| Bakgrund | Útbygging av fóðurkaini. |
| Gr undarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Byggisamtyktin<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 21/00041-1 Rætting - umsókn um byggiloyvi, leinging av fóðurbryggju<br>FK j. nr. 21/00041-2 Byggiumsókn til leinging av fóðurbryggju<br>FK j. nr. 21/00041-4 Prosjektgransking av teknisku deild hjá Fuglafjarðar kommunu<br>FK j. nr. 21/00041-7 LBF_Ragnar Heinesen_Rættaðar tekningar og frásøgn frá prosjektgranskingarfundi |

Viðgerð

| | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at geva byggiloyvi til útbyggingina av fóðurkaini sambært umsókn saman við tekningum, dagfest 13. januar 2021, og omanfyri nevndu fylgiskjølum, prosjektgransking og rættaðum tekningum og útbjóðingartilfari sambært henni. Eisini krevur kommunan eina ferðslutrygdarætlan, meðan arbeiðið er í gongd, og at neyðsynja akfør ótarnað kunnu sleppa framat og framvið arbeiðsøkinum og víðari út á kaina. Eisini skal HTU (Heilsu, trygd og umhvørvi) raðfestast høgt og umhvørvið í síni heild. |
| Dagf | 4. februar 2021 og 19. februar 2021 |

**Vinnu- og havnanevndin 12. februar 2021:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum.

**Býráðið 25. februar 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at geva Havsbrún byggiloyvi við teimum treytum, at tillagingar verða gjørdar soleiðis at projektið verður innanfyri byggisamtyktina.

5

## 6/21
## 21/00061-2 Dagføring av kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu - januar 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.01.2021 | 3/21 |
| 2 Tekniska nevnd | 11.02.2021 | 15/21 |
| 3 Orku- og umhvørvisnevndin | 12.02.2021 | 6/21 |
| 4 Býráðið | 25.02.2021 | 6/21 |

### Málslýsing

| Til viðgerðar í | Býráðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing | Sambært § 5, stk. 1 í kommunustýrislógini skal kommunustýrið áseta nærri reglur um síni stýrisviðurskifti í eini kommunustýrisskipan. Uppskot og broytingaruppskot til kommunustýrisskipan skulu hava tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.<br><br>Fuglafjarðar kommuna hevur eina tílíka kommunustýrisskipan, sum varð góðkend á fyrsta sinni í 2001 og er síðani dagførd nakrar ferðir.<br><br>Í sambandi við skipan av Fuglafjarðar býráð valskeiðið 2021-2024 tann 3. desember 2020 er neyðugt aftur at dagføra kommunustýrisskipanina, eitt nú tí at ein nýggj Orku- og umhvørvisnevnd er skipað.<br><br>Uppskot til dagføring av kommunustýrisskipanini er gjørt og er lagt við málinum til 1 viðgerð. Dagføringarnar fevna breitt í kommunustýrisskipanini.<br><br>**Ískoyti**<br>Tekniska nevnd hevur gjøgnumgingið dagførda skjali av kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu og hevur hesar viðmerkingar.<br>Umsitingin mælir til at broyta orðingina í §28 petti 3 skal broytast frá varðarndi orku til orkumál sum heild.<br>Umsitingin mælir til at broyta orðingina í §24 petti 5 skal broytast frá kavagrevstri til salting og kavagrevstur.<br>Umsitingin mælir til at seta eina orðing í um talgilding í kommununi, sum tekniska deild tekur sær av, og at talgilda kortið verður dagført leypandi. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">Ískoyti<br>Orku og umhvørvisnevndin mælir til at petti 3, verður umorðað, soleiðis at tað koma nøkur punkt afturat, soleiðis at tað eisini stendur:<br>- Orkusparandi tiltøk.<br>- Ljóðdálking.<br>- Ljósdálking.<br>- Luktdálking.<br>Fylgja við hvussu renovatiónin verður viðgjørd í Havna og vinnunevndini.<br><br>Framhald 19. februar 2021<br><br>Uppskoti til dagføring av kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu hevur síðani 1. viðgerð 28. januar verið viðgjørt nærri í umsiting og nevndum. Borgarstjórin og kommunustjórin mæla til, at býráðið við 2. viðgerð samtykkir verandi uppskot til kommunustýrisskipan.</td></tr>
<tr><td>Bakgrund</td><td colspan="3">Skipan av Fuglafjarðar býráð valskeiðið 2021-2024.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>Kommunustýrislógin og tilhoyrandi kunngerð<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>Uppskot til dagføring av kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu, dagfest 25. februar 2021</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>Nei</td><td>Nei</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>Nakað</td><td>Nakað</td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Borgarstjórin og kommunustjórin mæla til, at býráðið við 1. viðgerð samtykkir uppskotið til dagføring av kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu.<br>• Móttøkuplássið/renovatiónina.<br>• Náttúru og umhvørvi.<br>• Frílendi og grøn øki.<br>• Varandi orku.<br>• Umhvørvismál.<br>• Umhvørvisátøk, eitt nú eina árliga umhvørvisviku.<br>Nýggj punkt:<br>- Orkusparandi tiltøk.<br>- Ljóðdálking.<br>- Ljósdálking.</td></tr>
</table>

| | |
|---|---|
| | - Luktdálking.<br>- Luftdálking.<br>Mælt verður til, at hesi punktini verða lýst nærri í kommunustýrisskipanini. |
| Dagf | 23. januar 2021 og 19. Februar 2021 |

**Býráðið 28. januar 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0) 1. viðgerð av dagføring av kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu, og ynskir at kommunustýrisskipanin verður viðgjørd nærri í føstu nevndunum og í umsitingini.

**Tekniska nevnd 11. februar 2021:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum.

**Orku- og umhvørvisnevndin 12. februar 2021:**
Nevndin tekur einmælt undir við tilmælinum.



**Býráðið 25. februar 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0) við 2. viðgerð, at góðkenna dagføringina av kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjørður kommunu.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 7/21
## 21/00077-5 Íbúðarbygging úti á Land_Byggibúningararbeiði_Uppskot um at flyta bygningin og stuðlamúr 1 m longur oman ímóti sjóvnum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 11.02.2021 | 6/21 |
| 2 Býráðið | 25.02.2021 | 7/21 |

### Málslýsing

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd. |
|---|---|
| Stutt lýsing | Byggibúningararbeiðið í sambandi viðvíkandi íbúðarbygging úti á Land er í gongd.<br>Bygningur íroknað stuðlamúrum er staðsettur í GIS-skipanini í krosskipanini FOTM av teknisku umsiting og TN-Bygging í felag. Hetta fyri at allir arbeiðstakarar og ráðgevarar arbeiða í somu krosskipan.<br>Felagsfundur hevur verið millum umboð fyri ráðgevan í sambandi við byggibúningararbeiðið, Teknisktovan í Gøtu, umboð fyri TN-Bygging, sum skal byggja bygning og stuðlamúrar, umboð fyri Toftanes, og umboð fyri umsitingina í Fuglafjarðar kommunu.<br>TN-Bygging hevur broytt bygning og stuðlamúr naka í mun til útbjóðingartilfarið í sambandi við byggibúningararbeiðið. Tí var tað týdingarmikið at hava ein felags fund, har øll tosa sama mál og arbeiða út frá somu fortreytum.<br>Á felagsfundinum kom fram, at tað hevði verið skilagott at flutt bygningin longur oman, umleið 1,0 m. Hetta hevur fleiri fyrimunir við sær. Grevsturin kemur ikki so langt niðan undir verandi veg, og harvið verður betri pláss til ferðslu á verandi vegateini, meðan byggingin fer fram.<br><br>**Vegaprofilur í komandi vegin sær soleiðis út**<br>Tveir vegabanar á 3,25 m við einari vegabreidd á 6,5 m.<br>Parkering á 5 m oman og niðan<br>Gongubreyt á 2,0 m í niðara borð framvið nýggja bygninginum<br><br>**Uppskot til broytan av vegaprofili**<br>Gongubreyt í ovara borð á 1,5 m<br>Tveir vegabanar á 3,25 m við eini vegabreidd á 6,5 m.<br>Parkeirng á 5,0 m oman og niðan<br>Gongubreyt á 1,5 m í niðara borð framvið nýggja bygninginum.<br><br>**Ferðslutrygd við verandi vegaprofili** |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | Í verkætlanini er ikki teknað gongubreyt í ovara borð. Hetta verður hildið at vera sera óheppið. Tá er ongin trygd fyri, at børn kunnu renna beinleiðis út á vegbreytina.<br>Tá fólk bakka úr úr bilhúsinum, so skal frígangurin vera 7 m frá vegnum í ovara borð og oman til p-plássini uppá tvørs. Har er vegabreidin 6,5, og harvið er tað ov trongt til at bakka út á vegin.<br><br>**Ferðslutrygd við dagførda vegaprofilinum**<br>Nýggi vegaprofilurin er ferðalutryggari, havandi í huga, at gongubreyt á 1,5 m verður framvið verandi betonggørðum, sum standa út ímóti verandi koyribreyt í dag. Um ongin gongubreyt verður, renna børnini beinleiðis út á vegbreytina um verandi skørpu garðahornini. Eisini ber til at seta forðingsboylar við uttara kant á gongubreyt, har sum atgongd er frá húsunum og út á vegin, soleiðis at børn ikki renna yvir gongubreytina og út á vegin.<br>Við hesari loysnini ber til at bakka út á vegin, tá fráleikin frá ovaru síðu av vegnum og oman til parkeraðar bilar er 8 m.<br>Økið verður tillagað fyri at betra um útiøkið herundir gongubreytir og parkering. Verkætlanin verður tillagað upp til 1 m.<br><br>**Framhald 19. februar 2021**<br>Við tilmæli frá ráðgevanum, Teknistovan Gøta, og teknisku deild, mælti tekniska nevnd til á fundi 11. februar í ár, at flyta bygningin 1. metur longur oman móti fjørðuni. Mett verður, at tað møguligvís verður ein meirkostnaður av flytingini á umleið 500 tús. kr, men at tað ikki krevst eykajáttan til flytingina í løtuni. |
| Bakgrund | Betri arbeiðsumstøður undir byggibúningini og ferðslutryggari vegaloysn. |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>Byggisamtyktin og BK17<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 21/00077-1 Verandi staðseting av bygging<br>FK j. nr. 21/00077-2 Komandi staðsetin av bygging<br>FK j. nr. 21/00077-3 Innanhýsis notat viðv. broytingaruppskoti<br>FK j. nr. 21/00077-4 Kostnaðarmeting í sambandi við broyting |

| Viðgerð | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Ráðgevin og umsitingin mæla til at flyta byggingina 1 m longur oman ímóti fjørðuni. |
| Dagf | 3. februar 2021 og 19. februar 2021 |

**Tekniska nevnd 11. februar 2021:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum

**Býráðið 25. februar 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at taka undir við tilmælinum frá ráðgeva, umsiting og teknisku nevnd, at góðkenna flyting av bygninginum 1 metur oman móti fjørðuni.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**8/21**
**21/00105-5 Landingarkain_Pelagoskain_Umvæling av bankettini**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 12.02.2021 | 6/21 |
| 2 Býráðið | 25.02.2021 | 8/21 |



**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevndini. |
|---|---|
| Stutt lýsing | Marine Divers við Høgna Kjeld hevur gjørt havnamynduleikanum og umsitingini vart við, at bankettin á Landingarkaini ella Pelagoskaini, sum hon eisini verður nevnd, er í ringum standi. Tað var í sambandi við eina viðlíkahaldsskipan, at hetta varð staðfest. Víst verður til inngangandi skriv 6. februar 2021, sí FK j. nr. 21/00105-1. Marine Divers hava tikið upp ein undirvatnsfilm, har støðan á bankettini verður lýst.<br>Umsitingin kallaði inn til fund í gjár 9. februar, fyri at fáa lýst støðuna, og hvat er til ráða at taka, sí FK j. nr. 21/00105-2.<br><br>**Støðulýsing**<br>Í fundarfrágreiðingini er ein støðulýsing, hvat er hent við bankettini, og hvat er til ráða at taka í hesum førinum.<br>Bankettin er umleið 60 m long og 8 m breið. Dýbdin niður á bankettina er umleið 8 m. Uttanfyri bankettina er dýpið meira, einar 9 – 10 m.<br><br>**Niðurstøða**<br>Neyðugt er at fara í holt við at umvæla bankettina beinanvegin. Bankettin er tann parturin av einum kaianleggi, sum heldur uppá spunsið, soleðis at kain ikki dettur út niðri við botnin.<br><br>**Umvælingartilgong**<br>Umsitingin skipar fyri at gera eina arbeiðs- og tíðarætlan saman við havnamynduleikanum.<br>Mælt verður til at deila bankettinga upp í fasur og økir, hetta fyri at stýr á stabilitetinum á kaini og eisini í sambandi við fíggjarlig atlit.<br><br>**Arbeiðs- og tíðarætlan**<br>**Arbeiðsætlan**<br>1. Rudda banketting fyri skaddar gabiónir og tilfar<br>2. Fylla upp við gróti og javna yvirkant á bankett<br>3. Leggja eina stálrammu niður á bankettina og festa hana í spunsið<br>4. Stoypa niður yvir bankettina |

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">Mælt verður til at deila arbeiðið upp í trý økir á 20 m til longdar, hetta fyri at halda stýr á stabilitetinum á kaini.<br><br>Tíðarætlan<br>Tilrættalegging primo februar 2021<br>Arbeiðið byrjar um hálvan feburar 2021<br>Arbeiðið verður liðugt ultimo mars 2021<br><br>Framhald 19. februar 2021<br>Arbeiðið við at umvæla bankettina er byrjað. Væntandi tekur arbeiðið 1 mánað og kostar umleið 850 tús. kr. Fígging er tøk til endamáli. Til kunning hjá býráðnum.</td></tr>
<tr><td>Bakgrund</td><td colspan="3">Standurin á bankettini er vánaligur og má umvælast beinanvegin.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>Byggisamtyktin og BK17<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>FK j. nr. 21/00105-1 Marine Divers_Inngnangadi skriv<br>FK j. nr. 21/00105-2 Fundarinnkalling fyri at lýsa støðuna<br>FK j. nr. 21/00105-3 Innanhýsis notat frá fundi 9. februar 2021<br>FK j. nr. 21/00105-4 Marine Divers_Undirhondsboð</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Mælt verður til at fara undir fyrireikingarnar við atliti til at umvæla bankettina beinanvegin.</td></tr>
<tr><td>Dagf</td><td colspan="3">8. februar 2021 og 19. februar 2021</td></tr>
</table>



**Vinnu- og havnanevndin 12. februar 2021:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum.

**Býráðið 25. februar 2021:**
Borgarstjórin kunnaði býráðið um átroðkandi umvælingararbeiðið viðvíkjandi bankettini.

# 9/21
# 21/00132-3 Lillian Jacobsen innkallað sum tiltakslimur í sambandi við býráðsfund 25. februar 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.02.2021 | 9/21 |

## Málslýsing

| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing | Ólavur Larsen boðaði 20. februar 2021 kommunustjóranum frá, at hann hevur forfall til býráðsfundin 25. februar, og tí ynskti hann tiltakslimin Lillian Jacobsen kallaðan inn til býráðsfundin. Henda innkallan sambært § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini.<br><br>Lillian Jacobsen er fjórðvaldi limurin á lista Á við 40 atkvøðum í sambandi við kommunuvalið 10. november 2020.<br><br>Býráðið skal – samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini - fyrst á fundinum 25. februar gera av, um treytirnar fyri innkallan av tiltaksliminum Lillian Jacobsen eru loknar samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini. | | |
| Bakgrund | Ólavur Larsen, býráðslimur, hevur forfall til býráðsfundin 25. februar 2021 | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>**Kommunustýrislógin, kapittul 3**<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>**Teldubrævasamskifti við Ólavur Larsen og Lillian Jacobsen** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |
| Tilmæli | Borgarstjórin mælir til, at Lillian Jacobsen kann taka sæti í Fuglafjarðar býráð í sambandi við fundin 25. februar 2021 kl. 19:00. | | |
| Dagf | 25. februar 2021 | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Býráðið 25. februar 2021:**
Borgarstjórin kunnaði um, at hann hevði kanna gerðabókina frá kommunuvalnevndini í sambandi við kommunuvalið 10. november 2020, og at Lillian Jacobsen í hesum sambandi lýkur treytirnar fyri at taka sæti í Fuglafjarðar býráð.

Fundurin lokin kl. 19:40.

Gerðabókin lisin og góðkend



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Sonni á Horni

David Andreasen

Edva Jacobsen

Eivin Breiðaskarð

Gudny Vang

Magni Jøkladal

Lillian Jacobsen



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo